# TILTØK

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 317959, telefax 315727.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.00.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
8.7.-14.7. Bert telefonviðtala.
15.7.-21.7. Stongt.
22.7.-4.8. Bert telefonviðtala.

**Føroyingafelagið í Aalborg**
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis: Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Elin S. Wang, Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.











*Framhald av síðu 27*

Ásannast kann tó, at partalag eisini hevur sínar veiku síður. Av hesum kunnu m.a. nevnast, at spurningurin um, hvørt ein partalagsavtala kemur at virka eftir ætlan, velst um hvørt teir persónar, sum verða settir saman til at hava dagligu og yvirskipaðu leiðsluna av einari slíkari »verkætlan«, hava teir røttu persónligu eginleikarnar, sum skulu til fyri at passa saman við júst teimum persónum, sum hinir partarnir hava valt. Um hetta ikki er so, er tað nærum líkamikið, hvat partarnir hava skriva niður av góðum ætlanum – so vil ein partalagsavtala ikki koma til at rigga. Sigast kann tí, at altavgerðandi treytin fyri at ein partalagsavtala riggar er, at partarnir hava teir neyðugu persónligu førleikarnar fyri góðum samstarvi. Tørvur á slíkum persónligum førleikum kann tí máa burtur grundarlagið undir eini góðari »verkætlan«.

Eitt annað sermerkið við partalagi er, at byggiharrarnir mugu innstilla seg uppá, at tey krøv, sum verða sett til teirra luttøku í partalagi samanborið við vanligu avtaluháttirnar, eru ikki bert størri, men rættuliga nógv størri, enn teir eru vanir við. Byggiharrarnir mugu sostatt gera sær greitt, at teir gjøgnum alla verkætlanina koma til at taka beinleiðis lut í arbeiðinum. Byggiharrarnir vilja sostatt blíva drignir inn í nógvar detailspurningar, sum annars vanliga blivu loystir millum tekniska ráðgevan og byggifyritøkuna. Vísir tað seg t.d., at tað gerst neyðugt at broyta eitt hvørt á ein hátt, so tað eisini ávirkar kostnaðin, kann byggiharrin ikki blaka frá sær við boðum um, at hann hevur ein fastan prís, og tí má byggifyritøkan sjálv finna útav, hvussu hon loysir trupuleikan. Byggiharrin má í slíkum førum taka lut í, hvussu trupulleikin skal loysast. Hinvegin er fyrimunurin fyri byggiharran, at hann sum komandi brúkari av bygninginum fær høvi til so hvørt meðan byggiarbeiði fer fram, at gera vart við síni ynskir og sjónarmið. Innan vanligu avtaluhættirnar hevur byggiharrin einans haft møguleika fyri at seta fram síni ynski meðan »projekteringin« fór fram. Tá ið arbeiðið bleiv bjóða út kundi byggiharrin ikki longur – uttan at blíva møttur við munandi peningakrøvum – koma við ynskjum um broytingar.

Er talan um almennar byggiharrar, hevur tað eisini víst seg, at tað kann verða trupult at halda tíðarætlanir, um so er, at tað gerst neyðugt at hækka byggikostnaðin útum tann karm, sum var ásettur. Almennir byggiharrar skulu vanliga gjøgnum eina drúgva politiska viðgerð, fyri at fáa neyðugu peningajáttanirnar til ein hækkaðan byggikostnað. Hetta hevur í onkrum føri havt við sær, at arbeiðið hevur verið seinkað, meðan bíða bleiv eftir, at politiska viðgerðin gekk sína gongd.

Eisini á annan hátt hevur almenna lóggávan víst seg ikki at verða vælegnað til partalag. Almennir byggiharrar hava vanliga skyldu til at bjóða byggiarbeiði út í almenna lisitatión. Í partalagi er vanliga ikki talan um eina licitatión, men at byggiharrin longu frá byrjan velur eina byggifyritøku til at taka lut í menningini av byggiverkætlanini. Er talan um »verkætlanarpartalag« er tó møguligt at halda lisitatión tíðliga í verkætlanini. Trupulleikin tá kann verða nóg nágreiniliga at lýsa tey metingarstøði, sum byggifyritøkan skal metast og veljast eftir. Er talan harafturímóti um »strategiskt-partalag« er trupult at halda lisitatión av tí, at tær strategisku avtalurnar longu eru gjørdar, og tí onkursvegna áleggja pørtunum at brúka hvønn annan.

Eisini á løgfrøðiligu síðuni kunnu verða trupulleikar við partalagi. Í vanliga avtaluháttinum liggur tað nøkunlunda fast, hvørji viðurskifti byggifyritøkan hevur ábyrdina av – fyrst og fremst brek við byggingini – og hvørji t.d. ráðgevararnir hava ábyrgdina fyri – fyrst og fremst feil-projektering. Er talan um partalag, verða bæði byggiharrin og byggifyritøkan tikin við uppá ráð í teirri »projektering«, sum tekniski ráðgevin fremur og vanliga hevur ábyrgdina av. Um tað vísir seg, at feilur er í verkætlanini, kann tað ikki vísast aftur, at byggiharrin og byggifyritøkan kunnu fáa eina medábyrgd av slíkum brekum sum avleiðing av teirra aktivu luttøku í »projekteringini«. Á sama hátt kunnu teknisku ráðgevararnir og byggiharrin fáa eina medábyrgd fyri feilum í arbeiðinum hjá byggifyritøkuni. Neyðugt er tí greitt at takað støðu til árbyrgdarviðurskiftini í partalagsavtaluni.

Samanumtikið er tó ikki ivi um, at partalag kann betra um byggiviðurskiftini og um úrslitini. Tað er tí áhugavert at frætta, at Føroya Tele, sum tann fyrsti byggiharrin, hevur valt at lata partalag standa sína roynd í samband við byggivirksemi í Føroyum.








